# Neistin er favorittur

**HONDBÓLTUR** Hóast alt kann henda í einari finalu – eisini, um hon er yvir tveir ella tríggjar dystir – má Neistin liva við favorittstemplinum undan mansfinalunum ímóti KÍF

Hilmar Jan Hansen

Í allan vetur hevur Atlantic Airways-kappingin koyrt í tveimum, tí tað hevur verið Neistin og so restin. Av teimum næstbestu hava kollfirðingar tað mesta av tíðini verið teir bestu, og tí er tað eisini KÍF, sum fult uppiborið stendur hinumegin á vøllinum, nú Neistin langt um leingi spælir FM-finalurnar, liðið fyri fleiri mánaðum síðani vann sær rættin til.

Stigatalvan í Atlantic Airways-kappingini fortelur eisini eitt sindur um, hvussu suverenir teir bláu hava verið, tí tá øll liðini høvdu spælt sínar 24 dystir, var Neistin við sínum 43 stigum heili 13 stig framman fyri KÍF. Tá skal so eisini havast í huga, at Neistin ímóti endanum hevur sjuskað eitt sindur og tapt fyri bæði hoyvíkingum og strandingum.

Spurningurin er so, um tey bæði tapini kunnu hava verið eitt slag av vekjaraklokkum hjá Neistamonnum, ið ikki hava spælt nakran dyst av veruligum týdningi síðani steypafinaluna, ið var ímóti KÍF, sum forrestin eisini hevur tapt tveir dystir í síðstuni, tá finaluplássið longu var tryggjað.




*Mansliðið hjá Neistanum hevur spælt fýra landskappingardystir og steypafinalu ímóti KÍF, og Neistin hevur vunnið hvørja ferð. Nú fæst so at síggja, um KÍF megnar at broyta tað í FM-finalunum*

Mynd: Álvur Haraldsen

### Kjansurin hjá KÍF

Allar fýra ferðirnar, Neistin og KÍF hava hitst í landskappingini í vetur, hevur Neistin staðið eftir sum vinnari. Og eisini í steypafinaluni í februar, tá liðini møttust, var Neistin drúgvari og vann, umframt at Neistin fekk steypið til ognar, tí hetta var triði finalusigurin á rað.

Neistin var meistari í bæði 2008 og 2010, men í 2009 var liðið ikki í finaluni, tá H71 vann føroyameistaraheitið. Hinvegin hevur KÍF ongantíð fyrr verið í finaluni, so í allar mátar er støðan spildurnýggj hjá kollfirðingum.

Sjálvt um alt peikar á Neistan, so eru finalur altíð rættiliga opnar, og kjansurin hjá KÍF liggur heilt greitt í hesum fyrsta dystinum, sum verður á heimavølli í morgin. Kollfirðingar kunnu saktans gera ein vørr, og megnar liðið at spæla soleiðis, at tríggir finaludystir mugu til, er bara tað í sjálvum sær eitt bragd.

# Opið hjá kvinnunum

**HONDBÓLTUR** Royndirnar síðstu árini tala fyri Stjørnuni, men góða gongdin hetta kappingarárið kann geva Neistanum tað, sum skal til. Í kvinnufinalunum kann alt henda

Hilmar Jan Hansen

Síðstu sjey árini hava klaksvíkskvinnur veruliga sitið á trúnuni í føroyskum kvinnuhondbólti, tí Stjørnan hevur hetta tíðarskeiðið vunnið meistaraheitið fimm ferðir og steypakappingina seks ferðir. Eisini hevur Stjørnan mestsum verið partur í øllum finalum, sum yvirhøvur hava verið hesi árini, so tí hava spælararnir hjá Stjørnuni roynt alt tað, sum vert er at royna.

Tað hava spælararnir hjá Neistanum ikki, men hinvegin hevur Neistin sum felag gjøgnum árini vunnið ikki færri enn 36 meistaraheiti og 11 steypakappingar, ið eru hagtøl, einki av hinum feløgunum kann kappast við í søguligum høpi.




*Alt kann henda í finalunum hjá kvinnunum, so ikki er óhugsandi, at tað aftur – eins og í 2008 – verður neyðugt við trimum finalum, áðrenn vit vita, hvør er føroyameistari, Stjørnan ella Neistin*

Mynd: Álvur Haraldsen

Síðsta meistaraheitið hjá Neistanum finst tó afturi í 1997, men síðsta vunna steypakappingin er eitt sindur nýggjari, frá 2006. Tó skulu vit ikki longur aftur enn til 2008, tá júst Stjørnan og Neistin máttu út í tríggjar steypafinalur, tí Neistin heldur óvæntað vann ta fyrstu, men Stjørnan so tók hinar báðar og føroyameistaraheitið.

### Kunnu gerast tríggjar

Sunnudagin fæst kanska ein ábending um, um FM-finalurnar hesa ferð skulu minna um tær í 2008, so Neistin byrjar við einum sigri, ella um Stjørnan verður liðið, sum leggur betur út. Eftir teimum úrslitum at døma, ið hava verið síðstu tíðina, hevur Stjørnan ikki rættiliga havt tað góða, gamla flogið, meðan Neistin bara hevur tikið seg meira fram dyst fyri dyst.

Í Sunset-kappingini hava úrslitini í teimum fýra innanhýsis dystunum lagað seg soleiðis, at Stjørnan hevur vunnið sínar báðar heimadystir og Neistin sínar. Á vegnum hava liðini stríðst við eitt triðja oddalið, Tjaldur, sum streyk avstað við steypasigrinum, men ikki rakk á mál í landskappingini, men har hava bæði Stjørnan og Neistin staðið seg betur innanhýsis og vóru at enda uppløgdu finalistarnir.

Nógv kundi bent á, at spennandi støðan frá 2008 kann endurtaka seg, so liðini vinna hvør sína av teimum báðum fyrru finalunum, og at tað tí verður ein triðja finala, ið skal avgera alt.

*hilmarjan@sosialurin.fo*

## Dystir um vikuskiftið:

**Sunset-kappingin**

| | | |
|---|---|---|
| 17/04 | 15.00 | Neistin - Stjørnan |

**Atlantic Airways-kappingin**

| | | |
|---|---|---|
| 16/04 | 18.00 | KÍF - Neistin |

**Vodafonedeildin**

| | | |
|---|---|---|
| 15/04 | 18.00 | Víkingur - NSÍ |
| 16/04 | 15.00 | HB - 07 Vestur |
| 17/04 | 15.00 | ÍF - EB/Streymur |
| 17/04 | 15.00 | B36 - B71 |
| 17/04 | 15.00 | KÍ - B68 |

**1. deild menn**

| | | |
|---|---|---|
| 16/04 | 15.00 | Skála - AB |
| 16/04 | 15.00 | FC Suðuroy - HB II |
| 16/04 | 15.00 | 07 Vestur II - EB/Str. II |
| 16/04 | 15.00 | NSÍ II-FC Hoyvík |
| 16/04 | 15.00 | Víkingur II-TB |

**1. deild kvinnur**

| | | |
|---|---|---|
| 17/04 | 13.00 | AB-B36 |
| 17/04 | 13.00 | Víkingur-Skála |
| 17/04 | 18.30 | KÍ-HB |

# Sigur og javnleikur nóg mikið

Hilmar Jan Hansen

Bæði í Sunset- og Atlantic Airways-kappingini er galdandi, at tað í fyrsta umfari snýr seg um at vera best í tveimum dystum. Tað vil siga, at um annað finaluliðið vinnur annan finaludystin og spælir hin javnan, verður tað meistari.

Men vinna liðini hinvegin hvør sín dyst, verður talan um eina triðju finalu, sum er avgerandi fyri, hvør verður meistari.

Vinnarin í grundspælinum velur, hvar fyrsta finalan verður spæld, og í ár hava Stjørnan hjá kvinnunum og Neistin hjá monnunum bæði valt at byrja á útivølli ímóti ávikavist Neistanum og KÍF.

*hilmarjan@sosialurin.fo*